# Bøndur í fíggjarligum ófyri

Íslendsku bónda- og landbúnaðarfeløgini fáa altsamt fleiri fyrispurningar frá bøndrum, sum eru komnir ella stúra fyri at koma í fíggjarligt ófyri av rembingunum á íslendska og altjóða fíggjarmarknaðinum. Morgunblaðið skrivar, at nógvir bøndur hava gjørt stórar óløgur. Blaðið veit at siga, at onkur bóndi hevur veðskuld, sum er átta ferðir størri enn tann árliga inntøkan hjá garðinum, og tað er tvær ferðir meiri enn tað, sum vanliga verður mett ráðiligt, skrivar blaðið og vísir á, at inntøkan hjá bøndrunum er hækkað munandi minni enn útreiðslurnar til fóður, olju og annað.



# broytingar



## Tíðarætlan

Letter of Intent var undirskriva við Bankernes EDB Central (BEC) í juni í ár. Beint nú er umfatandi greining av verkætlanini í gongd, sum skal geva eina mynd av, hvussu stór uppgávan er, og hvat hon krevur. Greiningararbeiðið verður væntandi liðugt í heyst, og tá verður sjálv verkætlanin fyrireika. Onki evstamark er ásett fyri, nær BEC hevur allar tær peningaligu dáturnar úr Føroyum í hendi, men verkætlanin skal í øllum førum verða liðug einaferð í 2009.

og bíligum rakstri og tænastum til peningastovnarnar.

Framyvir skal Elektron verða eitt "profitcenter" - ein fyritøkua, ið skal virka undir teimum korum, sum eru á marknaðinum, við somu møguleikum sum aðrar fyritøkur.

- Vit hava tryggja okkum virksemi tey næstu fimm árini. Í hesum tíðarskeiðinum er ætlanin hjá Elektron at gagnnýta teir sera umfatandi førleikar og vitan, sum vit jú hava innan KT-veitingar til fíggjarheimin, til í minsta lagi at tvífalda um virksemi til kundar innan fíggjarheimin. Ein skal hava í huga, at Elektron hevur gjørt og rikið skipanir til peningastovnar í 43 ár, og vit hava tí stóra vitan um alla ta tøkni og ta kervi, sum er grundarlagi fyri fíggjarligum KT. Hesa vitan fara vit at gagnnýta til øktan útflutning - í fyrsta lagi til Danmarkar í 2009, sigur Sámal Samuelsen.

### Førleikar í toppklassa

Hann peikar á, at tað er sera sjáldan, at ein fyritøka við so hollari vitan um KT innan fíggjarheimin sleppur sær av við allar bindingar. Hetta ger, at Elektron verður ein sera kappingarførur leikari við einum førleikastøðið í toppklassa.

- Í Danmark eru tilsamans seks dátumiðdeplar til peningstovnar, harav fýra eru felags. Harafturat eru nakrar ráðgevingarfyritøkur á marknaðinum, so har er nakað av kapping. Ikki nakar breiður marknaður, men ein marknaður við stórari keypiorku. Eg loyvi mær at halda, at ongin onnur sjálvstøðug fyritøka á hesum marknaði hevur sama førleikastøðið sum Elektron, sigur Sámal Samuelsen.

# Vinnandi málstýring flytir mørk!

**Altjóða vinnuráðstevnan Faroexpo hevur nógv áhugavert at bjóða luttakarunum. Umframt partenariatið, sum verður í ítróttarhøllini í Runavík, verður eisini ein almenn ráðstevna í hølunum hjá Kelduni í Skálafirði. Á ráðstevnuni verða fýra spennandi fyrilestrar á skránni: *Røkk hægri málum gjøgnum samstarv millum gransking og vinnu***

FAROEXPO RÁÐSTEVNAN 2008
*Tíðindaskriv*

Eitt av evnunum á Faroexpo er vinna og gransking. Fyrsti fyrilesturin hevur heitið: Røkk hægri málum gjøgnum samstarv millum gransking og vinnu. Fyrilestrahaldari er danin Hans Jørgen Brodersen. Hans Jørgen Brodersen er útbúgvin civilverkfrøðingur innan altjóða tøkniráðlegging og umhvørvi. Hann hevur í mong ár starvast á Ålborg universiteti og verið virkisráðgevi í einari altjóða ráðgevingarfyritøku. Nú er hann leiðari á CHAT, sum er ein deild á universitetinum í Ålborg, sum hevur til endamáls at fáa verkætlanir í lag millum gransking og vinnu.

Hans Jørgen Brodersen er ein av slóðbrótarunum, tá ið tað snýr seg um at fáa universitet og vinnulív at samstarva. Ein av stóru verkætlanunum, ið tey arbeiða við í løtuni, er at framleiða heimsins besta badmintonketjara. Verkætlanin varir trý ár, og er eitt samstarv millum Ålborg universitet og ketjarafyritøkuna Forza.

### Hvussu røkkur tú tínum málum? – Møguleikar og avmarkingar í lívinum!

Næsti fyrilestrahaldarin er norska Randi Skare. Spennandi heitið á hennara fyrilestri er: Hvussu røkkur tú tínum málum? –Møguleikar og avmarkingar í lívinum! Randi Skare er útbúgvin MBA frá universitetinum í Brússel, og hevur eisini lisið MM í vitanar og netverksleiðslu á Handilsháskúlanum BI. Randi Skare hevur drúgvar undirvísingarroyndir bæði innan- og uttanlands.

Fyrilesturin hjá Randi Skare er sera viðkomandi hjá øllum, ið seta sær mál, bæði einstaklingum og virkjum, og gevur íblástur til, hvørji amboð skulu brúkast fyri at røkka hesum málum. Harafturat lýsir Randi Skare nær og hvussu hesi amboð verða nýtt fyri at náa uppaftur hægri málum, nær rætta tíðin er til tess, og hvørjar avbjóðingar gera seg galdandi.

Seinastu fjúrtan árini hevur Randi Skare arbeitt á Handilsháskúlanum BI, serliga innan økini strategi, marknaðarførsla og leiðslumenning. Hon hevur arbeitt nógv við einari verkætlan, sum nevnist Leadership in Action, har endamálið er at fáa tað besta og effektivasta fram í fólki gjøgnum virkni og hugsan. Randi Skare hevur harumframt verið við til at menna og gjøgnumføra eitt skeið, sum hevur heitið Verktøy for Tanken, sum var skraddaraseymað til Innovation Rogaland.



*Hans Jørgen Brodersen*



*Randi Skare*



*Kristin H. Roll*



*Katrin Olsen*

### Mál og avriksstýring innan aling

Triði fyrilesturin á ráðstevnuni verður við Kristin H. Roll, sum fera at greiða frá um mál og avriksstýring innan aling. Kristin Roll er norsk og hevur sína dagligu gongd á universitetinum í Stavanger. Hon hevur í mong ár arbeitt við málstýring í alivinnuni. Í mars í ár tók hon doktorgrad (phd) har evnið hjá henni var: Produktivitetur og effektivitetur í norsku alivinnuni.

Málstýring hevur stóran týdning. Ein orsøk til hetta er, at vit hava altjóða fólkaog búskaparligan vøkstur. Hetta viðførir stóran eftirspurning eftir mati úr sjónum. Av tí at flestu fiskastovnar eru nógv troyttir, og onkrir ov nógv troyttir, gevur hetta møguleikar fyri vøkstri innan aling, um framleiðslan er kappingarfør.

Møguleikin at framleiða laksin bíligari, hevur tí alstóran týdning um ein skal klára lyftið, sum ein av týdningarmiklu matvøruframleiðarunum í framtíðini. Tí hava øll viðurskifti sum ávirka framleiðsluvøkstur og effektivitet alstóran týdning.

### Hvussu kunnu mál flyta mørk?

Katrin Olsen, sum er føroyskur rógvari á altjóða støði, fer at halda fyrilesturin: Hvussu kunnu mál flyta mørk? Fjórði og seinasti fyrilesturin á ráðstevnuni fer at snúgva seg um málsetningar; hví tú setir tær mál, og hvussu tú nært hesum málum. Hvussu kann hetta yvirførast til vinnulívið?

Katrin Olsen er 30 ára gomul, útbúgvin lækni og hevur í nógv ár róð í frítíðini. Gjøgnum árini hevur hon sett sær strategisk mál, og í ár hevur hon luttikið í OL í Kina. Katrin hevur víst, at til ber flyta seg frá føroyskum kappróðri til DM, HM og OL.

### Ráðstevnan er almenn

Fyrilestrarnir eru sum áður nevnt viðkomandi bæði hjá eintaklingum og virkjum. Ráðstevnan verður mikudagin 22. oktober frá kl. 13.00 til 16.50 í ráðstevnuhølunum hjá Kelduni í Skálafirði. Kostnaðurin er kr. 680,- og til ber at tekna seg til ráðstevnuna á heimasíðuni hjá Faroexpo ella á tel. 666600.